## VIÐMERKINGAR

# Vil hava fútan at ákæra Ole Wich



BILL JUSTINUSSEN
Løgtingsmaður fyri Miðflokkin

**Landasvik! Tað skírir Bill Justinussen tað, sum Ole Wich hevur gjørt við at knýta orðið »homoFObia« at Merkinum. Løgtingsmaðurin heldur, at nøkur tingfólk og fjølmiðlarnir hava fingið støðu teirra samkyndu um skrúvuna**

Eg fari harðliga at mótmæla, at Ole Wich á ein so vanvirðisligan hátt dregur spott og skomm yvir Merkið og harvið land okkara, Føroyar, og allar føroyingar. At síggja óunniligu plakatirnar ella hvat tað nú er, sum hesin maður hevur framleitt, minnir í míni verð um landasvik. Ongin eigur at sleppa væl frá at knýta navnið »homoFObia« at bæði Merkinum og landi okkara. Tí fari eg á hendan hátt alment at heita á fútan um at reisa ákæru mótvegis hesum manni, tí sum føroying kenni eg meg vanvirdan, spottaðan og háðaðan.

Tað er ófatiligt, at nakar kann finna upp á at føra slíka vanæru yvir land okkara, sum er heimsins besta land at liva í. Um hesin maður hevur slíka neyð fyri teimum, sum líða, so er nóg mikið av veruligari líðing til úti í heimi. Nei, hetta snýr seg ikki um at hjálpa, men heldur á ein ógvuliga ólátaðan hátt at vinna nakrar lættvunnar krónur til fyritøkuna.

Tey samkyndu hava tað eins gott í Føroyum og øll onnur. Tey hava júst somu rættindi sum øll onnur til útbúgving, arbeiði, almennar veitingar av øllum slagi og at luttaka í samfelagnum á øllum økjum á jøvnum føti við øll onnur. Øll lóggáva er eisini galdandi fyri tey samkyndu, tí hesi eru hvørki undantikin ella tikin fram um á nøkrum lógarøki. Ongantíð havi eg verið vitni til, at føroyingar bólka fólk eftir teirra kynsliga samleika fyrrenn nú, ið krøv verða sett til okkum politikkarar um at bólka tey serstakt. Og tað er ikki vanligi føroyingurin, sum hevur framt hesa bólking, men fyrst og fremst teir politikkarar, sum hava reist málið á Løgtingi og so fjølmiðlarnir, sum onkursvegna tykjast at hava fingið støðu teirra samkyndu um skrúvuna.

Mín áheitan á samkynd, fjølmiðlar og viðhaldsfólk skal vera: gevist við at provokera fram eina forfylging, tí tað hava føroyingar ongan áhuga í. Føroyingar eru hampafólk, tolsamir og vinsælir. Væl kann vera, at onkur sigur okkurt, sum kann virka stoytandi her og har, men tað er ikki annað, enn øll menniskjur verða fyri av og á.

*bill@leita.fo*

# Sjúrður Skaale sum surrealistiskt sannleiksvitni



VIRGAR T. DALSGAARD

**– Kann tað passa, at Høgni Hoydal veruliga ikki visti, at Skaale Skaale tók samráðingarnar við Frank Jensen, táverandi løgmálaráðharra Danmarkar, upp á band? Spyr Virgar T. Dalsgaard, sum hevur ringt til Frank Jensen at fáa greiði hesum. Frank Jensen sigur, at hann gjørdi Høgna Hoydal greitt, at hetta var grovt brot á etisku reglurnar fyri slíkar samráðingar**

Í sambandi við, at fyrrverandi danski justitsministarin. *Frank Jensen,* stutt fyri nýggjár í eini samrøðu í *Sosialinum* avdúkaði, hvussu langt úti Høgnamenn vóru undir sonevndu *”samráðingunum”* á sinni, er okkara fasti tíðindabronglari, harra *Sjúrður Skaale* farin í bløðini og pástendur skammleyst, at *Frank Jensen* lýgur!

Substansurin í málinum er tann, at justitsministarin og hansara menn á sjálvum fundinum varnaðust, at Høgnamenn høvdu ein bandupptakara í gongd, uttan loyvi ella nakra forhondsavtalu. Hetta var so álvarsamt loyalitetsbrot, at FJ sleit fundin beinanvegin og tók *Høgna Hoydal* undir fýra eygum, har hann gav honum eina álvarsama moralska og juridiska belæring. Fundurin varð síðani uppafturtikin, uttan bandupptakara.

Hóast hetta, bedýrar nú okkara raski søgubronglari, harra SS, at bandupptakarin stóð frammi alla tíðina, soleiðis at øll sóu hann. Her er breið søgulig gjógv millum veruleikan hjá *Franki Jensen* og virtuella veruleikan hjá *Sjúrði Skaale.*

Tessvegna ringdi eg í dag, mikudag tann 4. januar 2006 til harra *Frank Jensen*, sum enn einaferð ógvuliga bastant váttaði, at Sjúrður Skaale als ikki er eftirfarandi!

Telefoniska versiónin hjá *FJ* er so álvarsom, at um *SS* ikki bakkar og alment etur orð síni í seg aftur, verður hann alt fyri eitt noyddur at stevna *Franki Jensen* fyri ærumeiðing!

At kalla orðaraðið var telefoniska frásøgnin hjá *Franki Jensen* nevniliga henda:

*”Mens vi var i gang med forhandlingerne, der overvejende var orienterende og fortrolige – vi havde jo slet ingen besluttende kompetence – opdagede en af justitsministeriets embedsmænd en ejendommelig vedvarende lyd, der kunne tyde på en båndoptagelse af vores tvangfrie drøftelser. Han orienterede mig øjeblikkeligt om sin mistanke. Jeg afbrød midlertidigt forhandlingerne og spurgte omgående hr. Høgni Hoydal, om vores samtaler blev ”båndet”.*

***”Ikke med mit vidende!”*** *svarede Hoydal.*

*Derefter spurgte vi en af hans nærmeste medarbejdere, hr. Skaale, og han måtte da modstræbende indrømme, at der var en båndoptager i gang.*

*Efter denne indrømmelse blev forhandlingerne fuldstændigt afbrudt, og jeg forlangte en alvorlig samtale på tomandshånd med Høgni Hoydal. Jeg foreholdt ham under denne samtale, hvilke alvorlige etiske regler, der gjaldt for slige drøftelser og lod ham vide, at der ikke kunne blive tale om en fortsættelse af forhandlingerne, med mindre han personligt garanterede mig, at alle båndoptagelser ville blive tilintetgjort. Dette lovede han, men et godt stykke tid efter havde en af vore folk spurgt S. Skaale, om han havde fået ødelagt de famøse bånd, men det benægtede han stadig på det tidspunkt med den begrundelse, at han endnu ikke havde fået skrevet dem ud!”*

**Søguligar avleiðingar**

Annars má tað fella flestum fólki lætt at vita, hvørjum tey heldur skulu trúgva – *Franki* ella ***Sjúrði*!** Frank hevur gott orð á sær, meðan Sjúrður fleiri ferðir er tikin sum, mjúkt sagt, rættiliga virtuellur realistur

Fyri komandi søgumenn er her ørgrynni av tilfari at kanna. Eitt nú, um *Hoydal* er *so* dølskur, at hann veruliga ikki visti, hvat *Skaale* fonglaðist við...? Hví helt HH ikki sítt lyfti, og syrgdi fyri, at SS strikaði tað kontroversiella band-tilfarð?

SS sigur, at ”øll”, altso eisini Hoydal vistu av bandupptakaranum! HH segði seg einki vita! Og mundi Skaale vera tann einasti í tí føroyska liðinum, sum ikki hevði reint mjøl í posanum? Ella var tað ein heil junta av húskøllum hjá Høgna, - og ikki bara ein bandittur, sum fuskaði sum amatør-agentur í einum bíligum James Bond-filmi – ein kyniskur bandi, sum nú er fúsur til at ofra Skaale sum tann naiva idiotin? Og hví skuldi *Skaale* fyrst skriva nakað út, aðrenn hann beindi fyri bondunum?

Er *SS* einasti seki í hesum ódamliga máli, hevur Hoydal ikki havt nóg tamarhald á sínum starvsfólki. Visti hann harafturímóti, hvat ið Sjúrður fuskaði við *”undir borðinum”*, hevur *HH*, sum sjálvur sat sum ministari fyri rættarmálum, brotið alla siðvenju sum parlamentarikari og kann ikki eiga moralskan rætt til at veljast aftur til nakað ting ella ráð, hvørki í Føroyum ella her á landi. Tað hevði tí klætt manninum at sagt frá sær bæði løgtings- og fólkatingssessin. Vit kunnu ikki hava illoyalar orðloysingar sitandi í lóggávutingum!!

Hesir ússaligu korruptu amatørar eru ikki beinleiðis at sammeta við blikksmiðjubandan í *Watergate*-málinum – tað hava teir for lítið format til – teir kunnu heldur ikki tekniskt metast við subtilar stór-njósnarar hjá *KGB*, ei heldur eru teir á niveau við kommunistiska *Stasi*-bandan, men kortini eru teir *andiliga* nærskyldir við brotsmenninar og eru líka so kemiskt fríir fyri moral, skammarkenslu og anstendigheit!

Tað tragikomiska í hesi ódelikatu episodu er, at teir ófólkaligu limirnir í hesum amatørbanda billa sær inn, at teir eru ovursmartir. Teir eru for óbegávaðir til at síggja, hvussu láturligir teir eru. Men tað hevur eydnast teimum at gera øllum føroyingum fyri skommum. Millum útlendskar embætismenn frættist skjótt, tá ið samráðingarmenn ikki hava nakran diplomatiskan kultur, og harumframt bæði eru perfidir, luskutir og illoyalir. Tí áttu hesir infantilu skølingar, sum álvarsliga kompromittera Føroyar, at verið permanent útihýstir úr bæði politikki og embætisliði! Eingin kann líta á teir! Men falski og ómansligi atburður teirra er enn eitt signal um, hvat slag av *politistati*, vit kundu vænta okkum, um tjóðveldismenn yvirtóku politivaldið!

# Steingja Skálafjørðin til frama fyri súkklur



REGIN JACOBSEN

**Ein brúgv um Skálafjørðin forðar fyri vinnuligum virksemi á fjørðinum, heldur Regin Jacobsen. Hann vísir á, at fleiri før í oljuvinnuni er hægri enn 50 m og fara tí ikki at sleppa inn á Skálafjørðin**

Í samband við at fast samband skal gerast millum Skálafjørðin og Suðurstreym, hevur Landsverk lagt fram ætlan um, hvussu teir meta at hetta sambandið kann gerast. Ein av møguleikunum sum Landsverk mælir til er at stabbabrúgv verður gjørd millum Saltnes og Strendur.

Landsverk vísir í sínum áliti á ymiskar fyrimunir og vansar við eini brúgv. Hesir eru, at viðlíkahaldið er 1 mió kr bíligari um árið enn ein tunnil, og at farleiðin er betri fyri »bleyta« ferðslu. Viðvíkjandi vansunum, so verður víst á hálku, vind og at ein slík brúgv forðar heilt stórum førum at koma inn á Skálafjørðin. Hetta kann serliga gera seg galdandi, um (tá) oljuvinnan er komin ígongd.

Viðvíkjandi mettu viðlíkahaldskostnaðunum, so førir Landsverk fram, at seinastu árini hava víst, at tunlar eru dýrari at viðlíkahalda enn upprunaliga mett. Spurningurin er hvørt henda niðurstøða byggir á nýggjar forskriftir fyri, hvussu ein tunnil verður bygdur, ella um niðurstøðan byggir á gamlar forskriftir fyri hvussu tunlar verða bygdir. Vit vita, at Norðskálatunnilin er dýrur; men høvuðsorsøkin fyri hesum man vera, at tunnilin er bygdur eftir ótíðarhóskandi forskrift. Talan er tí ikki um viðlíkahald sum so, men heldur eina dagføring av tunlinum.

Samanumtikið má niðurstøðan verða, at Landsverk byggir sítt tilmæli á, at tað hevur størri týdning at gjørligt er at súkkla yvir um fjørðin, heldur enn at fjørðurin kann nýtast til vinnuligt virksemi.

Ein slík brúgv fer, hóast hon er yvir 50 m høg, at avmarka møguleikarnar við Skálafjørðin bæði viðvíkjandi høgum skipum, útgerð til oljuvinnuna, og ikki minst tí avmarkaðu útskifting, sum er av sjógvi yvir Saltnesgrynnuna inn á Skálafjørðin. Sum skilst hevur Landsverk ikki kannað árinið á fjørðin hesum viðvíkjandi. Sagt verður einans hesum viðvíkjandi, at »umhvørviskanningar skulu gerast rundanum brúnna« – hvat tað so merkir.

Vansin við brúnni viðvíkjandi atkomuni til besta og størstu náttúruhavn í Føroyum - fjørðin, sum oljufeløgini hava valt til útgerðarhavn – er sera álvarsamur. Tað sum vit í dag ikki vita nóg nógv um viðvíkjandi høgari ferðslu inn á fjørðin í framtíðini, kann lættliga fara at vera ein tørvur, sum er nógv hægri enn ætlaða brúgvin.

Útgerðarskip til oljuvinnuna kunnu lættliga verða oman fyri 50 m til hæddar, og boripallurin sum komandi summar skal bora undir Føroyum, er sum skilst oman fyri 200 m høgur. Um ein rúgva av slíkum verður undir Føroyum um eini 10-20 ár, er væl ikki óhugsandi at hugsa, at ein tørvur verður á at slík før hava tørv at koma inn til eina stóra havn í Føroyum, og tá er Skálafjørðurin sjálvandi fyrsta og besta boðið.

*regin@bakkafrost.com*

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!